# Støðvakt og avloysarar til Auto

Auto søkir eftir støðvaktum og avloysarum. Megnar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn, so er tað kanska tær, vit leita eftir. Støðvaktin samskipar koyringina, tekur ímóti bíleggingum og røkir kioskina.

Vit vænta, at tú arbeiðir effektivt og sjálvstøðugt. Tú ert tænastu- og samstarvssinnað/ur. Ágrýtin, jalig/ur og dugir væl at loysa uppgávur undir trýsti. Tú hevur góðar førleikar at arbeiða við teldu, dugir væl at samskifta á enskum, og hevur tú royndir við at samskipa og planleggja, er tað ein fyrimunur.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum, einar 35 tímar í miðal um vikuna. Løn sambært avtalu.

Eisini hava vit tørv á avloysarum, sum kunnu hjálpa til gerandiskvøld, taka náttarvaktir um vikuskiftið og hjálpa til at røkja sølubúðina fríggja- og leygarkvøld/nátt.

**Umsókn**
Send tína umsókn til t-post: auto@auto.fo og viðmerk: støðvakt ella støðhjálpari. Seinasta freist at søkja er 22. juni, men umsóknirnar verða viðgjørdar so hvørt, og størvini verða sett sum skjótast.

Vilt tú vita meira um størvini, set teg í samband við Fríðhild Holmsund, leiðandi støðvakt, tlf. 790502.